LM-055/2022

Armgarð Weihe

Fra: Rithøvundafelag Føroya <rit@rit.fo>
Sendt: 8. november 2022 11:16
Til: Mentamálaráðið
Emne: Hoyringarsvar frá Rithøvundafelagnum til uppskot um nýggja bókasavnslóg

Til Uttanríkis- og mentamálaráðið

Rithøvundafelagið takkar fyri møguleikan at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um bókasøvn.

Yvirskipað tekur Rithøvundafelagið undir við uppskotinum og fegnast um, at bókasavnslógin loksins verður dagførd. Uppskotið er sent øllum limum felagsins, og felagið hevur eisini havt ein limafund um uppskotið.

Tað einasta, sum limir felagsins hava gjørt vart við, er ásetingin í § 22, stk. 2, har ásett verður, at eftirlivandi hjúnafelagi ikki longur skal arva rættin til bókasavnsgjald. Onkur limur heldur, at ongin skilagóð grund verður nevnd sum orsøk fyri at broyta hetta, og at Rithøvundafelagið sum yrkisfelag ikki kann taka undir við hesum. Onnur siga seg ivast í, hví hendan broyting verður gjørd. Mælt verður tí til, at hetta verður lýst nærri, áðrenn lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið, ella at hendan broyting verður tikin úr uppskotinum.

Vegna felagið

Arnbjørn Ó. Dalsgarð, skrivari

--
Rithøvundafelag Føroya
Undir Pisuvarða 2
100 Tórshavn
Faroe Islands

www.rit.fo